**Folia til innveggir á Glasi.**
Biðið verður um tilboð uppá lutvíst gjøgnumskygda plastfoliu til innandura glasveggir til undirvísingarhøli í høvuðsbygninginum. Folia skal ikki á glas hurðarnar.

Folian skal hava hava eitt gjøgnumskygni á umleið 40% hava fading í toppi og botni.

Liturin skal hava somu ella sambæriliga farvukotu sum verandi veggir á hæddini.

Glasir hevur gjørt ein royndarvegg í høvuðsbygninginum. Hesin verður brúktur sum útgangsstøði undir metingunum. Hetta merkir, at fyri at vinna útboðið er neyðugt, at loysnin er sum ella sambærlilig við dømi á Glasi.

Hjálagt er
- Flatumyndir av hæddum og hvørjar veggir talan er um
- Myndir í vísa dømi um loysn
- Oyðiblað at brúka ísv. tilboð, ið eisini inniheldur ávísar upplýsingar, mát v.m.

Glasir tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði, keypa plastfoliu til eina hædd ella ávís øki. Tilboðið skal tí vera fyri hvørja hædd sær.

**Veiting**
Veitarin skal sjálvur taka mát (mátini hjá Glasi eru vegleiðandi). Folian skal setast upp av veitaranum og skal vera íroknað tilboðsprísin. Folian vera skal vera sett upp í seinasta lagi 1. februar 2025.

**Dygd**
Viðvíkjandi dygd verður mett um snið, góðsku, haldføri og reingerð. Stigatal er frá 0 – 10, og byggir á eina heildarmeting og í mun til verandi foliu.

**Tænasta**
Tillagingar skulu skjótt kunna gerast og tilvísing til líknandi veitingar er ein fyrimunur.

**Meting**
Tilboðið við hægsta karakteri, eftir at hesin er vektaður við 50 – 40 – 10 fyri ávikavist: Prís 50%, dygd 40% tænasta 10%, vinnur útboðið.

Til ber at seta spurningar til Glasir, Álvur Jøkladal, leiðara á bygningsumsitingini á alj@glasir.fo.

Spurningarnir skulu vera inni í seinasta lagi 12. desember 2024. Møguligir spurningar og svar verða løgd á keypsportalin.

| | |
|---|---|
| Sýn av hølum: | mikudagin 11. Desember 2024. |
| Spurnarfreist: | hósdagin 12. Desember 2024. |
| Freist at lata tilboð inn: | týsdagin 17. Desember 2024 kl. 12:00 |
| Tilboð latin upp: | mikudagin 18. Desember 2024 |
| Vinnari kunngjørdur: | hósdagin 19. Desember 2024. |
| Veitingardagur: | í seinasta lagi 14. februar 2024. |

**Sýn av hølum, verandi folliu og dømi um loysn**
Glasir hevur gjørt royndaruppseting av foliu, ið veitarar kunnu síggja við at luttaka á sýnisfundinum.  Tey ið ynskja at luttaka á sýninum kunnu venda sær til alj@glair.fo fyri at avtala nærri.

**Mannagongd og krøv**
Veitarin skal við teksti og myndum vísa loysnina, herundir hvussu veitarin fremur uppsetingina og tryggjar dygdina í hesi. Veitarin skal hava møguleika at vísa vøruna fram. Er vøran ikki á goymslu, skal veitarin vísa á kunda, har møguligt er at síggja líknandi vøru.

Tað er neyðugt, at liturin, dygdin, formurin v.m. á plastfoliuni er lík tí plastfoliu, ið er á rútunum í dag. Hetta tí nýggja folian verður sett á hina síðuna av glasrútinum, har verandi folia verður verandi.

Glasir tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum, at taka av tilboði fyri eina hædd ella lutvísa uppsetan samb. avtalu.

Glasir skilar sær rætt til at havna einum tilboði (sum um talan var um undangóðkenning), um vøran á órímiligan hátt ikki livur upp til ynskini í útboðstilfarinum.

Tilboð, íroknað fylgiskjøl, skulu sendast til alj@glasir.fo

**Dømi: royndarveggur á Glasi**

